# TAÐ ER TÍÐIN

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## Ræðslan er 15 krónur fyri liturin av bensini

Ófriður í oljuframleiðandi londum hevur við sær, at prísurin á olju hækkar. Breiðir ófriðurin seg til Saudi Arabia, so kann tað fáa álvarsamar avleiðingar fyri oljuprísin. Saudi Arabia stendur fyri 10 prosentum av oljuframleiðsluni í heiminum.

- Avleiðingin av ófriði í Saudi Arabia kann verða, at oljuprísurin hækkar til 150 dollarar fyri fatið. So kunnu vit fáa bensinprísir á 14-15 krónur fyri liturin, sigur Christian Tuxen, greinari hjá Danske Bank, við Ritzau.

Metprísurin fyri fatið av olju er frá 2008, tá ið fatið kostaði umleið 145 dollarar í styttri tíð.

## Heimagangandi hava sunnari børn



Eitt granskaralið á North Carolina State University heldur seg hava funnið fram til, at børn, har annað av foreldrunum er heimagangandi, eru minni sjúk og fáa færri skaðar. Kanningin er gjørd av 89.000 børnum yvir 20 ár.

Millum annað vísur granskingin, at børn, har bæði foreldrini arbeiða úti, hava 200 prosent størri møguleika fyri at fáa astma, at bróta bein ella at verða eitrað.

– Tað er umráðandi, at vit eru tilvitað um fyrimunir og vansar við, at bæði foreldrini hava arbeiði, og tað er tørvur á at stuðla arbeiðandi mammum meira og at skilja teira støðu, sigur Dr. Melina Morrill við Daily Mail.

Gransking í USA hevur annars eisini víst, at tað eru fyrimunir við, at bæði foreldrini arbeiða. Tey vinna meira pengar, og sjálvsálitið verður størri.

## Kaloriutabellir onga ávirkan



Síðani 2008 hevur verið kravt av matstovum í New York, at tær skulu vísa kaloriutalið á øllum matarlepum. Hetta skuldi gerast fyri, at fólk kundu síggja, hvussu nógvar kaloriur vóru í ymsu réttunum, og har við velja teir lættaru rættirnar.

Men soleiðis hevur tað ikki gingið. Ein kanning hjá New York University School of Medicine vísur, at fólk eta eins nógvar kaloriur á matstovum nú, sum tey gjørdu fyri 2008. Kaloriutabellirnar hava einki broytt, og prísurin á matvørum spælir eftir øllum at døma størri leiklut inn kaloriuinnihaldið.

## Brotsgerðin í USA



2. mars verður fyrsti partur av amerikanska útgávuni av sjónvarpsrøðini Brotsgerðin sýnd í USA. Ein av stóru amerikansku sjónvarpsstøðunum hevur keypt røðina, sum vit kenna væl her á okkara leið. Sofie Gråbøl er í donsku upprunaútgávuni í leiklutinum sum Sarah Lund, og hon var støðugt í troyggju frá Guðrun & Guðrun. Nú fáa amerikumenn so eina nýggja innspæling av røðini, og haryviri hevur røðin fingið heitið The Killing við undirheitnum Who killed Rosie Larsen? Í nýggju røðini er Sarah Lund blivin til Sarah Linden, og Keypmannahavn er skift út við Seattle.

## Burgarabrúdleyp





Í Hong Kong eru tey farin at halda brúdleypsveitslur á burgarabarrum. Tað er McDonalds ketan, sum nú bjóðar nýgiftum at halda veitsluna á teirra matstovu, og tað ber til at hava upp í hundrað gestir á onkrari av matstovunum. Prísurin fyri burgarar til tey er bert 2000 krónur. Síðani januar hava fleiri valt at halda sínar brúdleypsveitslur á McDonalds í Hong Kong.

## Heimsins populerast fartelefon




Tað er ikki ein iPhone, ein HTC smartphone ella ein Blackberry. Heimsins populerasta fartelefon er ein gomul, kend Nokia telefon.

Nokia 1100 er ikki tann flottasta og best útgjørda fartelefonin, men hon hevur selt 250 milliónir kring heimin. Tað er serliga í Afrika og Fjareystri, at telefonin hevur verið væl umtókt, og ummælini frá brúkarum hava verið sera positiv. Serliga verður fegnast um, at fartelefonin hevur langa livitíð, og at hon heldur tað, sum hon lovar – at hon kann ringja og senda sms-boð.

Nokia 1100 fartelefonin kom á marknaðin í 2003.